# Visjón um føroyska arbeiðsmarknaðin

**Strategibólkurin, sum hevur orðað visjónina um føroyska arbeiðsmarknaðin í 2015, er komin til ta niðurstøðu, at vit skulu hava ein rúmligan, vælvirkandi, mennandi og tryggan arbeiðsmarknað, har tað er lætt at bjóða fram og fáa kvalifiseraða arbeiðsmegi**

VISJÓN 2015
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Málini, sum strategibólkurin hevur orðað fyri framtíðar føroyska arbeiðsmarknaðin, eru hesi:

- tann rúmligi arbeiðsmarknaðurin
- tann vælvirkandi arbeiðsmarknaðurin
- tann mennandi arbeiðsmarknaðurin
- tann tryggi arbeiðsmarknaðurin
- lætt at bjóða fram og fáa kvalifiseraða arbeiðsmegi

Bólkurin sigur, at yvirskipaða málið soleiðis er, at rúm skal verða fyri øllum á arbeiðsmarknaðinum.

– Øll skulu hava møguleika fyri einum virknum arbeiðslívi, og eingin skal vera fyri mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna skerdan arbeiðsførleika ella onnur persónlig viðurskifti.

## Vælvirkandi

Málið, sum strategibólkurin hevur sett sær, er ein vælvirkandi arbeiðsmarknaður, har arbeiðsmarknaðarlóggáva og arbeiðsmarknaðarskipanir samvirka, soleiðis at ósemjur og trætumál á arbeiðsmarknaðinum verða loyst skjótt og væl.

– Allar arbeiðsmarknaðarlógir skulu dagførast og gerast tíðarhóskandi, sigur bólkurin.

Lagt verður aftrat, at ósemjur og sáttmálabrot skulu loysast í eini rættarskipan, og her verður víst á, at sáttmáli um fastan gerðarrætt er gjørdur millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Samfelagslig áhugamál skulu havast í huga.

## Lívslong læra

Yvirskipaða málið fyri tann mennandi arbeiðsmarknaðin er "lívslong læra", sum bólkurin tekur til.

– Øll, sum í størri ella minni mun eru knýtt at arbeiðsmarknaðinum, verða partur av eini førleikamenningarskipan. Á henda hátt hava hesi altíð møguleika fyri at økja um førleikar sínar. Hetta hevur samstundis við sær, at fakliga flytiførið, sum tað verður nevnt, eisini verður økt.

Málið er, at arbeiðstøka arbeiðsmegin skal hava møguleika fyri at førleikamenna seg, eitt nú við skeiðum og stytri útbúgvingum. Serligur dentur skal leggjast á førleikamenning av teimum ófaklærdu.

Við í visjónsætlanunum er eisini, at framhaldandi eftirútbúgvingarskipanir skulu skipast, soleiðis at málið um førleikamenningartilboð til øll – uttan mun til starv ella bústað – kann røkkast.

## Tryggur marknaður

Her er yvirskipaða málið at seta í verk persónligar eftirlønarskipanir, sum samvirka við fólkapensjónina og samhaldsføstu pensjónina.

– Til tess at tryggja fíggjarligt lívsgrundarlag í pensjónsaldri, skulu øll, sum eru á arbeiðsmarknaðinum, gjalda í eina alment góðkenda eftirlønarskipan.

Her ger visjónsbólkurin vart við, at hetta er ein fyribilsorðing, og at semja ikki er fingin um endaligu orðingina enn.

– Samfelagið hevur evstu ábyrgdina av, at øllum er tryggjað lívsgrundarlag við pensjónsaldri, sigur bólkurin.

## Kvalifiserað arbeiðsmegi

Strategibólkurin sigur, at allir meinbogar fyri at bjóða fram og fáa kvalifiseraða arbeiðsmegi skulu beinast av vegnum, bæði tá ið talan er um arbeiði í Føroyum og arbeiði uttanlands.

– Føroyar skulu verða ein arbeiðsmarknaður. Samferðslukervið skal verða væl útbygt, ferðakostnaðurin millum heim og arbeiðspláss skal verða lítil, og bústaðar-og barnaansingarmøguleikarnir skulu verða góðir um alt landið.

Bólkurin hevur sett sær sum mál, at tað skal verða lætt hjá føroyingum at bjóða fram sína arbeiðsmegi uttanlands.

– Útbúgvingarkrøv og útbúgvingarstandardir eins og løggildingar skulu verða í samsvari við krøvini aðrastaðni.

Strategibólkurin leggur aftrat, at um nóg mikið av kvalifiseraðari arbeiðsmegi ikki er tøk í Føroyum, skal tað gerast lætt hjá arbeiðsgevara at fáa neyðuga útlendska arbeiðsmegi til tað tíðarskeið, sum tørvur er á.



*– Øll, sum í størri ella minni mun eru knýtt at arbeiðsmarknaðinum, verða partur av eini førleikamenningarskipan, sum ger tað møguligt hjá arbeiðsfólki at økja um sínar førleikar, sigur strategibólkurin fyri arbeiðsmarknaðin*

# Stuðlið fjølbroyt

**Vit fara á hesum báðum síðunum at taka aftur í aftur ein part av tí, sum kom fram, tá ið Kitty May Ellefsen, formaður í strategibólkinum fyri íverksetan, var liðug við sína framløgu. Sjálv framløgan verður viðgjørd á báðum síðunum undan hesari í blaðnum í dag**

ÍVERKSETAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jóhan Páll Joensen, vinnulívsmaður, helt, at tað at vera íverksetari ikki er nakað, tú lærir. Tað er meira viðføtt. Hann helt tó, at stuðlast kann uppundir íverksetan.

– Vit kunnu stuðla fjølbroytni, sum hann tók til.

Vinnulívsmaðurin helt, at tað eru stór – og umráðandi – mál, sum strategibólkurin fyri íverksetan hevur sett sær.

Hann ásannaði, at vit eru ikki øll eins.

– Ert tú á sjónum, sært tú, áðrenn ein maður byrjar at arbeiða umborð á skipi, hvør dugur verður í honum. Tað eru teir, sum bjóða seg fram – teir, sum rætta hondina fram og ikki halda seg aftur, sum vilja nakað.

Jóhan Páll helt, at eins og heimini eiga at gera tað, eigur skúlin eisini at uppala ein hugburð.

– Vit eiga at leggja tað besta niður í ungdómin, og vit eiga at menna ungdómin, segði hann.

## Skúlaverkið

Formaðurin í Føroya Lærarafelag, Magnus Tausen, vísti á, at allir næmingarnir, sum ganga í fólkaskúlanum, til seinast skulu ígjøgnum sama nálareyga – og hareftir er útbúgvingin lagað.

Hann helt, at lærarar sjálvandi kunnu læra nógv av vinnulívinum við at seta sær spurningin, hvat tað er, sum vinnulívsfólk duga betri enn lærarar.

Hann helt ikki, at allir lærarar eru eins.

– Vit hava nógvar ymiskar lærarar, og tað vísir seg eisini, at lærarar kunnu brúkast nógvastaðni í samfelagnum – og summir koma so aftur í lærarastarv.

Hann helt, at skúlaverkið eigur at seta sær spurningin, hvussu lærarautbúgvingin kann tillagast, soleiðis at íverksetanin er við.

– Eg veit ikki, um tú kanst læra til íverksetara – ella um hetta bara er viðføtt.

Magnus Tausen søknaðist annars eftir eini íverksetaramentan innan tað almenna.

Jóannes Ejdesgaard, løgmaður, sum eisini er útbúgvin lærari, helt ikki, at allir lærarar eru eins.

– Nei, tað eru teir ikki, legði hann dent á.

Løgmaður vísti aftur til tíðina í Føroyum, tá ið ein lærari ofta var um næmingarnar í gomlu bygdaskúlunum.

– Jú, tað er so vist, at ein lærari kundi avrikað nógv og leggja nógv gott niður í børnini, segði hann.

Áki Johansen, sum er limur í strategibólkinum, helt, at umhvørvi eisini kann gera ein til íverksetara.

– Hetta er ikki bara viðføtt, legði hann aftrat.

## Aftur á lunnin

Óli Breckmann, løgtingsmaður, helt, at skúlin aftur eigur at framala íverksetanarhugin í næmingunum.

– Lærarautbúgvingin hevur ikki havt til endamáls, at næmingarnir skulu fáa egg undan hønuni. Útbúgvingin hevur í staðin havt til endamáls at sleppa inn í tað almenna.

Løgtingsmaðurin helt fyri, at sildberarnir mugu gerast fleiri í samfelagnum, sum hann tók til.

– Skúlin eigur í øllum stigum at fortelja næmingunum, at vit liva ikki bara av føstum lønum – og av at umfordeila. Vit eiga at hava virðing fyri teimum, sum seta bátarnar á lunnin, segði Óli Breckmann.

Kitty May vísti til stuttleikar á orðini hjá onkrum klókum høvdi, sum hevur sagt, at ert tú ikki kommunistur sum ungur, hevur tú einki hjarta – og ert tú ikki spekulantur sum gamal, hevur tú einki høvd.

## Føroyar og jantelóg

Í síni framløgu helt Kitty May fyri, at jantelógin trív-



*– Ert tú á sjónum, sært tú, áðrenn ein maður byrjar at arbeiða umborð á skipi, hvør dugur verður í honum. Tað eru teir, sum bjóða seg fram – teir, sum rætta hondina fram og ikki halda seg aftur, sum vilja nakað, segði Jóhan Páll Joensen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*